VB - Skála 2-0 (0-0)

# Vágbingar fingu fyrsta sigurin

**Tað mundi fella ein tung byrða av herðunum hjá VB-leikarunum sunnudagin, tá tað endiliga eftir sjey royndir eydnaðist teimum at vinna ein dyst í landskappingini. VB brendi samstundis sítt triðja brotsspark í hesum kappingarárinum**

1. DEILD
*Stefan í Skorini*



*VB vann sín fyrsta sigur í ár, tá skálamenn vórðu sendir heimaftur við ongum. VB megnaði tó at brenna sítt triðja brotsspark í landskappingini í ár*
*MYND: Áki Bertholdsen*

VB fekk endiliga sín fyrsta sigur, og Skála tapti fyri áttandu ferð á rað í landskappingini. 2. deildarfótbóltur spøkir nú av álvara inni á Skála.

Tað vóru tvey sera sperd lið, sum runnu inn á vøllin á Eiðinum í Vági sunnudagin. Hesi liðini vóru tey einastu, sum enn ikki høvdu vunnið í 1. deild í ár. VB var favorittur undan dystinum og fekk eisini ein gyltan møguleika at leggja seg framum, tá bert tríggir minuttir vórðu leiktir.

Eftir eitt hornaspark bríkslaði dómarin fyri brotssparki, sum Milan Kulic varð settur at skjóta. Málverjin Eugen Voda, sum aftur hevði fingið álitið millum stengurnar, tveitti seg tó væl og bjargaði í stórum stíli. Hetta var triðja brotssparkið, sum VB hevur brent í ár.

Og tað er kanska ógvuliga symptomatiskt fyri VB, tí liðið hevur ikki havt marginalarnar á sínari síðu. Trý brend brotsspørk geva tó eisini eina ábending um vánaligar skjúttar.

### Skert Skála-lið

Skála manglaði tríggjar leikarar til dystin móti VB. Teir vóru Bogi Gregersen og Sveinur Justinussen, sum vóru leikbannaðir, og Arnhold Berg, sum var leikbannaður. Tó var Marius Joensen, sum hevur verið niðri í Danmark, aftur at síggja á liðnum.

Tá hópurin frammanundan er í veikara lagi, er tað torført at klára seg uttan so nógvar leikarar.

Og Skála hevði eisini stórt mannfall í fyrra hálvleiki. Fyrst fekk Bent Djurhuus ein skaða og mátti av vøllinum eftir fimtan minuttir. Inn fyri hann kom Rói Jacobsen. Síðani bleiv Agnar Højgaard eisini skaddur og varð skiftur út við Jógvan Martin Hansen. Skála misti sostatt tveir verjuleikarar í fyrra hálvleiki, og venjarin Johan Nielsen mátti flyta spælarar runt á vøllinum.

VB hevði yvirvág allan dystin og skapti fleiri málmøguleikar enn Skála. Tí var tað eisini uppiborið, at heimaliðið fór við sigrinum.

Tó gekk long tíð, áðrenn VB endiliga fekk hol á. Tað var tann stóri syndarin frá fyrra hálvleiki, Milan Kulic, sum legði VB framum tá umleið eitt korter var eftir at spæla.

Tað var Palli Augustinussen, sum legði innfyri úr høgru síðu, og Milan Kulic setti høvdið á bóltin, og so var 1-0. Hetta mundi koma sum ein stórur lætti fyri VB-liðið, tí hesin dysturin skuldi vinnast fyri teirra viðkomandi.

Fleiri høvdu ta kenslu, at hóast nógvar málmøguleikar fór VB at hava torført við at draga sigurin í land. Leikararnir vóru eisini blivnir fjálturstungnir, sum dysturin leið.

### Birgir slær sigurin fastan

Fimm minuttir eftir fyrra málið skorar Birgir Jørgensen til endaliga úrslitið 2-0. Jón Pauli Olsen vinnur nærdyst við ein verjuleikara, og bólturin dettur til ein púra leysan Birgir, sum sendir flatt framvið málverjanum.

Tað eydnaðist sostatt VB at fáa fyrsta sigurin í ár, meðan Skála nú er útifryst í botninum. Tað verður ógvuliga torført hjá skálamonnum at bjarga sær luttøku í fyrstu deild komandi kappingarár.

Mikukvøldið er FS Vágar gestur á Skála. Um botnliðið ikki vinnur hendan dystin, er ilt at síggja, hvussu teir kunnu lívbjarga sær.

VB fær EB/Streym á vitjan, og vágbingar ætla sær nú at fáa samband við hini liðini. Við einum sigri kann VB fara framum FS Vágar og fáa samband við EB/-Streym.

**VB - Skála 2-0 (0-0)**
1-0: Milan Kulic
2-0: Birgir Jørgensen
**VB:** Bjarni Johansen - Dejan Nicolic, Slobodan Madzar, Michael í Lágabø - Milan Kulic, Dan Djurhuus, Palli Augustinussen, Mortan úr Hørg - Jón Pauli Olsen, Birgir Jørgensen (Janus Kjærbo), Predrag Ziskovic
**Skála:** Eugen Voda - Agnar Højgaard (Jógvan Martin Hansen), Dusan Jaic, Bent Djurhuus (Rói Jacobsen), Iulian Florescu - Marius Joensen, Alexandar Jovevic, Hanus Thorleifsson, Pauli Hansen, Alexandur Johansen - Jónhard Frederiksberg

## GÍ kom ikki víðari

INTER-TOTO
*Stefan í Skorini*

GÍ tapti samanlagt 5-1 í Inter-Toto Cup dystinum móti FC Dacia Chisinau úr Moldava. Seinni dysturin var leiktur á Tórsvølli leygarkvøldið, og FC Dacia vann 1-0, eftir at tað stóð á jøvnum 0-0 við steðgin.

Fyrri dysturin endaði við 4-1 sigri til FC Dacia. GÍ roydni at leggja trýst á gestirnar, men tað eydnaðist ongantíð veruliga at bróta ígjøgnum. Tað hevur verið sera strævið hjá GÍ-leikarunum seinastu vikurnar. Hetta var fjórði dysturin innanfyri tvær vikur.

TB - VB 3-1 (1-0):

# Óli Johannesen aftur á Sevmýri

**Við tveimum málum legði júst heimvendi Óli Johannesen lunnar undir sigurin hjá TB á arvafíggindanum úr Vági í jóansøkudystinum á Sevmýri leygarkvøldið**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

Undan umfarinum hetta vikuskiftið lá 2. lið hjá VB frammanfyri 1. lið hjá TB. Tað er helst eindømi í fótbóltssøguni, at næstbesta liðið hjá vágbingum hevur ligið frammanfyri besta liðið hjá TB í stigatalvuni.

Leygardagin høvdu tvøroyrarmenn tó møguleikan at leggja VB afturum seg aftur í landskappingini í 2. deild, tí tá hittust liðini í jóansøkudystinum á Sevmýri.

Óli Johannesen er komin aftur úr Danmark, og hann var aftur at síggja á TB-liðnum. Eisini vóru útisetarnir Jón Tórur Holm og Tórur Mortensen aftur at síggja í hvíta og svarta TB-búnanum. VB hevði hinvegin mist nakað av fólki til 1. deildarhópin til hendan dystin.

### Eingin ivi

Tað var ongantíð nakar ivi um, hvat betra liðið var á Sevmýri leygarkvøldið. TB setti seg á dystin frá fyrsta bríksli, og tað var tann burturvilsti sonurin Óli Johannesen, ið legði heimaliðið framum fyri steðgin. Hann royndi seg við langskoti, sum streyk í netið. 1-0 var eisini støðan við steðgin.

Allan Michelsen var maðurin, sum legði TB framum 2-0 eftir steðgin. Hann varð spældur leysur og gav málverjanum ongan møguleika at bjarga. Tað var eisini ein stórur smeitur fyri VB, at Magni Jacobsen varð noyddur at fara av vølli við skaða beint undan tí næsta málinum.

Óli Johannesen var enn einferð á blettinum løtu seinni, tá hann stútaði eitt hornaspark í netið til 3-0, og tá var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Sigmund Mikkelsen minkaði um munin til endaliga úrslitið 3-1 við einum vøkrum máli. Hann snýtti tveir verjuleikarar hjá TB, áðrenn hann sendi framvið málverjanum.

TB er framvegis við í stríðnum um uppflytingina, og við landsliðshetjuni Óla Johannesen á liðnum fáa tvøroyrarmenn helst fleiri stig í skjáttuna enn tey trettan, sum teir hava nú. Tað er øllum greitt, at Óli Johannesen er í einum heilt øðrum flokki enn vanligir 2. deildarleikarar, og tí styrkir hann ómetaliga nógv um liðið. Tó er ikki greitt um Óli fer at spæla við TB alt árið.

**TB - VB 3-1 (1-0)**
1-0: Óli Johannesen
2-0: Allan Michelsen
3-0: Óli Johannesen
3-1: Sigmund Mikkelsen



# ÍF misti á stokkinum

**Trý reyð kort vóru partur av undirhaldinum, tá ið fyrrverandi ÍF spælarin í AB í evstu løtu javnaði til 1–1**

AB–ÍF
*Heri á Rógvi*



*Johnny Samuelsen hevur bóltin við føturnar, meðan verjuleikarin hjá ÍF bíðar eftir næsta leikinum hjá AB-framherjanum*
*Mynd: Heri á Rógvi*

Áskoðarafjøldin boðaði frá, at talan var um týdningarmikla uppgerð. Ikki so fá vóru komin úr Fuglafirði, og argjafólk eru so smátt farin at skilja, at tey eiga eitt fótbóltslið, sum er á veg ímóti toppinum.

Heimaliðið levði bragdliga fyri, og álopsspælararnir báðir, Eyðun Samuelsen og Jan B. Jørgensen høvdu møguleikar at gera mál, men teir høvdu ikki eydnuna við sær.

Gestirnir fótaðu sær, og teir fingu fulla úrtøku burturúr fyrsta møguleikanum, sum teir spældu seg til. Eftir uppspæl í høgru og innlegg frá Atla Petersen fekk Hanus Eliasen úr stuttari fjarstøðu møguleikan, og hann sveik ikki men skoraði til 0–1.

ÍF leiðslumálið hevði við sær, at heimaliðið eina løtu fór niður við nakkanum. Nú var tað ÍF, sum spældi seg til møguleikar, men kortini kom einki mál afturat undan steðginum.

Seinna umfarið hevði ikki sama leikliga støðið, sum hevði verið í 1. hálvleiki. ÍF kendi sjálvandi ikki ábyrgd fyri at skapa undirhald, og AB megnaði ikki at skipa álopsspæl.

Seinna partin av 2. hálvleiki gjørdist trýstið ímóti ÍF málinum alt meiri støðugt, og tað eydnaðiast AB, ið hevði Pætur Dam Jacobsen sum stýrimann á miðvøllinum, at javna, tá ið seinna umfarið var 47 minuttir gamalt. Innkast varð tveitt í brotsteigin, bólturin datt fyri føturnar á Jan B. Jørgensen, sum í fjør var besti ÍF málskjúttin, og hann minti fuglfirðingar á, at máltevinum framvegis einki bilar. Jan skoraði, og harvið fingu báðir partar eitt stig.

Ónollur skemmaðu síðstu løtuna. AB verjuspælarin Magnus Jacobsen sá reytt, tá ið hann við skumpi vildi vísa dómaranum sína misnøgd, og eftir at AB hevði javnað sóu tveir afturat reytt. AB verjuspælarin, Bernhard Petersen, fekk fyrst gult kort fyri at drála ov leingi, tá ið hann skuldi skjóta málspark. Hann gav til kennar, at hann ikki var samdur við dómaran, sum aftur tók gula kortið úr lummanum, og harvið noyddist Bernhard av vøllinum. Og John Thomsen hjá ÍF sá eisini reytt í síðstu løtu, tá ið dómarin fyri aðru ferð hevði víst honum gula kortið.

**2. deild**
AB–ÍF 1–1 (0–1)
0–1: Hanus Eliasen
1–1: Jan B. Jørgensen

# Jákup veit einki um framtíðina

**Molde skuldi havt spælt í Stavanger sunnudagin, men tað bar ikki til, tí tað regnaði so illa**

NOREG
*Jóannes Hansen*



*Enn er óvist hvar besti føroyski málverjin Jákup Mikkelsen fer at spæla eftir summarfrítíðina*

Jákup Mikkelsen er í dag ein leysur maður. Í gjár var sáttmálaskeiðið við Molde liðugt. Norska kappingin er nú farin í stutta summarfrí, og tá ið teir fara undir aftur kappingina um tvær vikur, verður Jákup Mikkelsen ikki í Molde.

Sum vit hava skilt tað, so er tað ikki greitt, hvat Jákup Mikkelsen fer at spæla fótbólt í framtíðini. Hann hevur einki ítøkiligt tilboð fingið. Marknaðurin er svikaligur í løtuni, men tað verður framvegis vónað, at føroyski landsliðsmálverjin, sum fyri stuttum fekk so gott skoðsmál frá týska landsliðsvenjaranum Rudi Völler, skal fáa sáttmála við okkurt útlendskt felag.

Um tað ikki eydnast at finna nýtt arbeiðspláss til Jákup Mikkelsen uttanlands, so bendir alt á, at hann og familjan flyta aftur til Føroya um hálvan juli. So verður spurningur, hvat føroyskt felag fer at fáa klørnar í hann.

### Regnaði burtur

Sunnudagin skuldi Molde havt spælt í Stavanger ímóti Viking. Men tað regnaði so mikið illa í Stavanger, at teir mettu tað ikki vera ráðiligt at spæla. Molde er framvegis rættuliga illa fyri á støðutalvuni.

Tað er Rosenborg ikki. Hesa ferð vunnu teuir 4–1 ímóti Bryne, og teir eru nú ellivu stig undan hinum liðunum.

Stabæk hevur roynt at hingið uppií Rosenborg. Sunnudagin megnaðu teir ikki meiri enn 1–1 í Ålesund, og tað fekk venjaran hjá Stabæk at staðfesta, at kappingin um gullið er liðugt. Hann roknar avgjørt ikki við, at nakar fer at skala teir úr Tróndheimi.

Stabæk venjarin heldur, at kappingin bara snýr seg um silvurmerkini. Í tí kappingina er Sogndal rættuliga væl fyri. Sunnudagin vunnu teir 2–1 á heimavølli ímóti Bodø/Glimt. Sigursmálið, sum teir fingu í yvirtíðini, ber við sær, at Sogndal nú er næstfremst.

Lillestrøm er tað felagið, sum hevur verið longst í bestu deildini í Noregi. Men nú stendur rættuliga illa til. Sunnudagin taptu teir 5–0 á útivølli í Skien ímóti Odd Grenland. Tað verður roknað við í Noregi, at Lillestrøm fer at fáa tógvið stríð í heyst fyri at varðveita plássið í bestu deildini.

# Sumbingar sannførandi

**Sumbingar løgdu jóansøkuaftan alin afturat møguleikanum at vera við í stríðnum um plássið, sum ber við sær endaspæl um eitt pláss í bestu deildini.**

2. DEILD SUMBA–B68
*Jóannes Hansen*

B68 vitjaði á Krossinum. Toftamenn hava tað eins torført, sum teir hava havt tað hinar ferðirnar, tá ið næstbesta liðið hjá teimum hevur roynt seg í næstbestu deildini. Higartil hava teir bara fingið eitt stig, og leygardagin versnaði frammanundan vánaligi málmunurin nógv. Sumba vann 5–0.

Dánjal D. Joensen skoraði einasta málið í 1. hálvleiki. Í 25. minutti smekkaði hann fríspark í meskarnar aftanfyri Mortan Hansen.

Eftir steðgin var munurin á liðunum meiri sjónskur. Sumba økti til 2–0, tá ið 2. hálvleikur var fýra minuttir gamalur, teir fingu aftur mál í 67. og 68. minutti, og eitt korter undan dystarenda staðfestu teir rimmar sigurin. Sonne Kjærbo skoraði til 2–0, Eirikur Joensen til 3–0, spælandi venjarin, Robert Cieslewicz, sum beinanvegin eftir steðgin loysti Berg Djurhuus av, økti til 4–0, og René Thomsen fekk síðsta málið.

Í 2. hálvleiki kom tað næstan ikki fyri, at B68 søkti at málinum, hjá sumbingum, har Marcin Dawid ikki hevði stórvegis at takast við.

Á liðnum hjá Sumba vóru tríggir fremmandir spælarar frá dystarbyrjan, og tá ið Robert kom inn, var útlendingakvotan full. B68 liðið var mannað við heilt ungum spælarum og eisini onkrum veteranum. Eitt nú var Ingemar Højgaard í miðverjuni, og Aksel Højgaard setti seg sjálvan á vøllin, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Millum ungu menninar vóru Ovi Magnussen, Gestur Lómstein, Jan Joensen, Hans Erik Danielsen og Símun Olsen, sum kom inn, tá ið seinna umfarið var hálvrunnið.

**Sumba–B68 5–0 (1–0)**
1–0: Dánjal J. Joensen 25.
2–0: Sonne Kjærbo 49.
3–0: Eirik Joensen 67.
4–0: Robert Cieslewicz 68.
5–0: René Thomsen 75.